# Jóladøgurðar av Morskranesi

*Á Morskranesi ganga fleiri hundrað dunnur í einum gerði, sum gjørt er til dunnugarð burturav. Ætlanin er at víðka virksemið*

Edvard Joensen

**Morskranes:** Nøkur hundrað føroysk húsarhald kunnu fáa jóladøgurðan av Morskranesi, um alt gongur eftir ætlan hjá Mortani og Lydiu Justesen. Tey hava nevniliga lagt seg eftir at ala dunnur, sum skulu takast og seljast fram móti jólum.

Á einum gerði á Morskranesi hava tey umleið 1.700-1.800 dunnur gangandi. Hetta eru dunnur, tey sjálvi ala til dráps fram móti jólum.

Hesin dunnugarðurin er ivaleyst tann einasti av síni stødd í landinum. Og gongur, sum væntandi er, og tað gjørdi í fjør, verður eingin trupulleiki at sleppa av við dunnurnar, sigur Lydia Justesen. Tey hava longu onkrar bíleggingar frá privatfólki, men hava tó ætlanir um at selja til heilsølur eisini.

Í ár hava tey umleið 1.000 dunnur fleiri, enn tey høvdu í fjør. Tá varð selt til onkrar heilsølur, umframt at gravgangur varð eftir dunnum stutt fyri jól, tá salmonella varð funnin í innfluttum dunnum.

Lydia Justesen sigur, at hetta er ein spennandi roynd, tey eru farin undir. Tey keyptu gerðið fyri nøkrum árum síðan og hildu, at tá nú flestu onnur hava seyð gangandi á slíkum stykkjum, hevði tað verið stuttligt at roynt okkurt annað. Tað varð til dunnur.

Tað hevur síðan vundið upp á seg. Ein klekimaskina kom. Síðan ein onnur, sum er rættiliga nógv størri.

Tað er nevniliga soleiðis, at allar dunnurnar eru undan egnum fuglum. Tey hava einar 50-60 verpingardunnur, sum byrja at verpa longu í februar mánað og halda á til eftir ólavsøku.

-Nú er við at vera liðugt, sigur Lydia Justesen.

Tey hava so tikið eggini undan teimum og goymt, til klekjast skuldi í maskinunum.

Samstundis hava tey eisini lagt seg eftir at betra slagið, tey hava. Tey hava bara sett tær størstu við til verpingardunnur. Soleiðis hava tey fingið slag, sum í vekt kann metast javnt við tær innfluttu dunnurnar.

Tó halda tey, at føroysku dunnurnar roynast væl betri. Tey frætta frá fólki, at tær svinna nógv minni enn tær innfluttu. Og tær smakka nógv betri, siga tey eisini frá.

Lydia Justesen heldur grundina til, at so er, vera sera einfalda. Dunnurnar hava tað gott, meðan tær liva. Tær ganga frítt. Og tær liva longri enn tær útlendsku. Av tí sama verður ikki neyðugt at pressa tær upp í vekt við tvingsulsfóðring.

Um tað ber til at sleppa av við allar dunnurnar í heyst, hava tey ætlanir um at byggja út og fara undir veruliga vinnu við hesum, sigur Lydia Justesen. Tey hava, sum er, bara tvær bingjur, sum unganir ganga í, tá teir eru nýklaktir. Men ætlanin er at byggja eina høll, sum fer at gera umstøðurnar upp aftur betri. Tá fer eisini at bera til at seta meira við, eins og goymsluumstøðurnar til eitt nú fóður gerast nógv betri.



*Dunnuhald kann gerast nýggjur vinnuvegur á Morskranesi*

**Mynd: Edvard Joensen**

# Fleiri smolt á Selatrað

*Smoltstøðin hjá P/F Sandá á Selatrað fer at tvífalda fiskatalið, tá útbyggingin, sum nú verður gjørd, verður liðug*

Edvard Joensen

**Selatrað:** Smoltstøðin á Selatrað verður í løtuni bygd út til at klára tað dupulta av verandi framleiðslu.

Seks áttametur kør verða sett upp í staðin fyri tríggjarmetur kørini, sum brúkt hava verið frammanundan. Hesi smáu kørini verða koyrd burtur. Hvørt av teimum stóru, nýggju kørunum hevur sama kapasitet, sum seks av teimum smærru høvdu, sigur Høgni Jacobsen, stjóri í P/F Sandá.

Samstundis sum kørini verða skift út, verður eisini ein høll bygd, har nýggju kørini fara at standa inni. Tað er ikki tí, at tað er nakað krav, at kørini skulu standa inni, sigur Høgni Jacobsen. Men tað ger tað nógv arbeiðsligari, vísir hann á.

Útbyggingin økir fiskatalið á støðini frá 700.000 til knappliga hálvaaðru millión.

Høgni Jacobsen sigur, at útbyggingin samstundis gevur møguleika fyri at lata størri fisk, enn teir kundu gera, sum er. Hann vísir eisini á, at tørvurin á smolti í Føroyum er øgiliga stórur.

-Í grundini gera vit nú bara tað sama, sum allir aðrir gera, sigur Høgni Jacobsen og vísir til, at hendan støðin er ikki tann einasta føroyska smoltstøðin, sum byggir út.

Umframt størri kør og høll fær smoltstøðin hjá P/F Sandá á Selatrað eisini biofilturannlegg. Tað vil siga annlegg, sum reinsar vatnið og brúkar tað umaftur.

Tað er neyðugt, sigur Høgni Jacobsen, tí vatnnøgdin er í so lítil á Selatrað. Nú hesin óvanligi turkurin hevur verið í summar, hevur viðhvørt staðið á at fingið nóg mikið av vatni. Og einki hevur verið gjørt út yvir tað mest neyðturviliga, sigur hann.

Høgni Jacobsen sigur, at hendan útbyggingin, sum nú verður gjørd, kostar umleið seks milliónir krónur.

Smoltstøðin á Selatrað er fimtan ára gomul, og bygt hevur verið út so hvørt, sum tørvurin er vaksin.



*Smoltstøðin hjá P/F Sandá á Selatrað fer at tvífalda framleiðsluna tá útbyggingin er liðug*
**Mynd: Edvard Joensen**



# Norðurlendska samstarvið skal vera ein fyrimynd

*Norðurlond hava lætt við at samstarva, og hetta samstarv skal verða ein fyrimynd hjá til dømis londunum á Balkan, heldur Jógvan við Keldu, annar av føroysku limunum í Norðurlandaráðnum*

Eyðun Klakstein

Meðan tjóðir aðrastaðni í Europa loysa stríðsmál við blóðugum stríði, tosa Norðurlond um tingini og finna fram til samstarv ístaðin.

Hetta samstarv fer millum annað fram í Norðurlandaráðnum, og Jógvan við Keldu, sum er annar av føroysku limunum í Norðurlandaráðnum heldur, at norðurlendska samstarvið skal verða ein fyrimynd hjá til dømis londunum á Balkan-hálvoynni

- Vit vita ikki, hvussu gott vit hava tað í Norðurlondum, og hvussu lætt vit hava at samstarva, sigur Jógvan við Keldu, sum fyri kortum vitjaði í Jugoslavia, har hann millum annað hevði fund við býráðslimir í Beograd.

- Vit síggja til dømis samstarvið, sum nú fer fram tvørtur um Oyrasund, og hetta samstavið kemur bara at økjast, sigur hann.

### Stuðlar útjaðaranum

Í síðstu viku hevði Norðurlandaráðið fund í svenska býnum Haparanda, og júst hesin býurin hevur gjørt eitt samstarv tvørtur um markið við finska býin Torniå. Har fara børn um landamark í skúla og til ymisk frítíðarítrív, og býirnir hava gjørt eina menningarætlan fyri økið.

- Norðurlandaráðið arbeiðir í hesi tíð hart fyri at verja útjaðaran, sigur Jógvan við Keldu og vísir á, at tað finnast tvey sløg av útjaðara. Eitt land, sum liggur í útjaðaranum, og eitt øki í einum landi, sum liggur í útjaðaranum.

- Í Føroyum verða vit noydd at samstarva meira, og til dømis er tað upplagt, at Klaksvík fer at samstarva við býir í Eysturoynni, tá undirsjóvartunnilin kemur um Leirvíksfjørð um nøkur ár, sigur hann.

Jógvan við Keldu og Dan Reinert Petersen eru føroysku løgtingsumboðini í Norðurlandaráðnum, og teir eru so at siga grannar - við einum fjørði ímillum. Teir hava javnan havt samstarvið millum Klaksvík og Fuglafjørð uppi at venda.

### Mugu minna á Føroyar

Føroysku umboðini í norðurlandanevndini hjá Norðurlandaráðnum mugu javnan minna hini londini á, at Føroyar, Ísland og Grønland hoyra til Norðurlond.

- Serliga Svøríki og Finnland hava størri hug at hyggja eystureftir, til baltisku londini, tí har er eitt øki, sum kemur at mennast nógv næstu árini, men Føroyar, Ísland og Grønland hoyra til Norðurlond, og tí skulu vit verða við, eisini tá tað kemur til samstarv eystureftir, sigur Jógvan við Keldu.

Tá norðurlendski fundurin var í Svøríki í síðstu viku, vóru fløggini hjá teimum sjálvstýrandi pørtunum av Norðurlondum - Føroyar, Áland og Grønland - ongastaðni at síggja, og tað varð gjørt vart við fra føroyskari síðu, og Álland tók undir við hesum.

- Vit skulu ikki grenja, men vit mugu minna á, at vit hoyra til Norðurlond, sigur Jógvan við Keldu.



*- Vit skulu ikki grenja, men vit mugu minna á, at vit hoyra til Norðurlond, sigur Jógvan við Keldu, limur í Norðurlandaráðnum*

# Frambrot í norðurlendska samstarvinum

*Føroyar fara nú at fáa fastan lim í nevndina fyri Norðurlendska Mentanargrunnin, og tað verður mett at verða ein sigur fyri føroyingar*

Eyðun Klakstein

Á fundi í Norðurlandaráðnum í síðstu viku var ein broyting í viðtøkunum fyri Norðurlendska Mentanargrunnin løgd fyri nevndina.

Hendan broyting, sum væntandi verður samtykt í næsta mánaði, fer at hava við sær, at Føroyar fáa fastan lim í nevndini fyri mentanargrunnin.

- Tað verður ein stórur fyrimunur fyri Føroyar at hava ein fastan lim í nevndini, tí so eru vit altíð til staðar, tá mentanargrunnurin hevur fundir, sigur Jógvan við Keldu, sum er limur í Norðurlandaráðnum.

- Tú kanst av røttum ivast í, um til dømis álendingar hava førleikan til at greiða frá og stuðla grønlendskum umsóknum, tá tær eru fyri í nevndini, og tað er somuleiðis galdandi tá grønlendingar og føroyingar sita í nevndini.

Higartil hava 11 limir sitið í nevndini fyri mentanargrunnin; tveir fyri hvørt lima land, og so ein limur, sum hevur sitið fyri tey trý sjálvstýrandi londini, Føroyar, Áland og Grønland. Triðja hvørt ár hevur Føroyar átt limin.

Broytingin í nevndini fyri mentanargrunnin leggur upp til, at nú verða tað 13 limir í nevndini. Tveir fyri hvørt av londunum, sum eru limir, og síðani ein fyri hvørt av sjálvstýrandi londunum.

### Sigur fyri Føroyar

Málið um at lata sjálvstýrandi londini fáa hvør sín lim í nevndini fyri mentanargrunnin var í síni tíð reist av Harriet Andersson av Álandi, Lisu Lenerth úr Grønlandi og Signari á Brúnni úr Føroyum.

Jóannes Dalsgaard, sum hevur sitið sum limur triðja hvørt ár, hevur virkað fyri málinum, hvørjaferð hann hevur havt umstøður til tað, og tað hava løgtingsumboðini eisini gjørt.

Og nú er líkt til, at hetta stríðið hevur givið úrslitið. Danski formaðurin í Norðurlendska Mentanargrunninum, danin Søren Hansen, tók á fundinum í síðstu viku til, at nú kundi føroyingarnir fara fegnir heimaftur, tí hetta var ein stórur sigur fyri Føroyar.

### 25 milliónir um árið

Norðurlendski Mentanargrunnurin hevur á hvørjum ári 25 milliónir krónur at býta út árliga, og hendan útbýting fer fram tvær ferðir um árið - 15. mars og 15. september.

Seinastu árini hevur grunnurin á hvørjum ári fingið millum 700 og 1000 umsóknir at viðgera. Í fjør varð latin stuðul til 199 umsóknir, men árini frammanundan nakað fleiri.

Føroyskar umsóknir fáa eisini á hvørjum ári stuðul. Í fjør fingu fýra føroyskar umsóknir stuðul, og stuðulsupphæddin til føroyingar var samanlagt 305.000 krónur. Í 1998 var stuðulin til føroyingar 820.000 og í 1997 1,1 millión.

Tað eru bæði privatfólk, feløg, virki og stovnar, sum fáa stuðul frá mentanargrunninum, og latin verður stuðul til alskyns mentanarlig tiltøk og arbeiði. Alt frá klassiskum listaarbeiðið til ymiskt innan kunningartøkni og multimiðlar.


AEROBIC SPINNING OG BALLETT

NÚ BYRJA VIT AFTUR

**Yndi** *kann bjóða øllum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, stórum sum smáum, sterkum sum veikum.*
**Byrjað verður mánadagin 28. august og halda vit á til 03. desember**

SPINNING

**Sum nakað spinnandi nýtt kunnu vit nú bjóða tímar í SPINNING, sum seinastu árini er vorðin sera vælumtókt víða um. SPINNING er sera gott fyri ♥, lungu og blóðrenslið. SPINNING er sera konditiónsstimbrandi og ein ógvuliga góður háttur at klænka seg. SPINNING kann íðkast av øllum, eisini teimum við veikum liðum ella ryggi.**

*Tíðirnar eru:*

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 18:15 – 19:05 Spinning *Byrjarar* | 16:00 – 16:50 Spinning *Byrjarar* | 18:30 – 19:30 Spinning *Vand* | 19:30 – 20:20 Spinning *Byrjarar* |
| | 20:00 – 21:00 Spinning *Vand* | | 20:30 – 21:30 Spinning *Vand* |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

| | | Skúlanæmingar |
|---|---|---|
| 1 ferð um vikuna: | 490 kr. | 20% avsláttur |
| 2 ferðir um vikuna: | 790 kr. | 20% avsláttur |
| 3 ferðir um vikuna: | 1050 kr. | |

**Vigar tú ov nógv? ....Her er kjansurin!**
**Trimma & Spinn**

FEITTKNÚSARI

**Sum nakað nýtt bjóða vit teimum, ið viga meiri enn 10 kilo ov nógv, venjing tvær ferðir um vikuna. Byrjað verður við styrkivenjingum fyri búk, rygg, enda, armar og bein. Síðani verður farið at spinna, har tað serliga er blóðrenslið og feittbrenningin, ið dentur verður lagdur á.**

*Tíðirnar eru:*

| Mánadag | Mikudag |
|---|---|
| 19:30 - 20:00 Trimm | 19:30- 20:00 Trimm |
| 20:00 - 21:00 Spinn | 20:00 - 21:00 Spinn |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ
1050,- kr.

AEROBIC

**Trimmari – Aerobic – Steppbonkur – Venjing uttan hopp – Mix – Menn**

*Tíðirnar eru:*

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| 17:15 - 18:15 Aerobic *Byrjarar* | 15:00 - 16:00 Trimmari *Øll* | 17:15 – 18:15 *Kvinnur* Uttan hopp | 17:15 – 18:15 Aerobic *Byrjarar* | 15:00 – 16:30 Mix |
| 18:15 - 19:30 Aerobic *Vand* | 19:00 – 20:00 Trimmari *Øll* | 18:15 – 19:30 Cirkulvenjing *Øll* | 18:15 - 19:30 Aerobic *Vand* | |
| 20:00 - 21:00 *Menn* | 20:00 - 21:00 Steppbonkur | | 19:30 – 20:30 Trimmari *Øll* | |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

| | 60 min. | 75 min. | Skúlanæmingar |
|---|---|---|---|
| 1 ferð um vikuna : | 490 kr. | 610 kr. | 20 % avsláttur |
| 2 ferðir um vikuna: | 790 kr. | 990 kr. | 20 % avsláttur |
| 3 ferðir um vikuna: | 1050 kr. | 1310 kr. | |

BALLETT

**Byrjað verður mánadagin 28. august og halda vit á til 03. desember**
*Tíðirnar verða hesar:*

| Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|
| 16:00 - 17:00 *9-10 ár* | 16:00 – 17:00 *11-12 ár* | 16:00 – 17:00 *13 ár og eldri* |
| 17:00 - 18:00 *6-8 ár* | | |
| 18:00 - 19:00 Dansur *Vaksin* | | |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ
6-12 ár: 375 kr.
13 ár og eldri: 490 kr.
Ringið ella komið yvir í YNDI leygardagin 26. august millum kl. 15:00 og 17:00 ella møti bara til tíman.

**Fá meira at vita hjá Yndi, kom framvið og fá tær ein faldara og eitt prát. Møguligt er at fáa ókeypis royndartíma í SPINNING og AEROBIC. Møguleiki er hjá feløgum, fyritøkum o.ø. at leiga tímar í Yndi.**

**Tilmelding verður í Yndi, Yviri við Strond 21, leygardagin tann 26. august frá kl. 15.00 til kl. 17.00**

**Komið inn á gólvið ella ringið á tel.: 311 311, 310 025 ella 312 868.**



YNDI v/ Elsu Mariu Bærentsen

Yviri við Strond 21
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 311 311
Fax: 318 527
e-mail: yndi@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820